

*Fyri fyrstu ferð verður Fleyr nú partur av steypafinaluni hjá monnum. Hesum syrgdi havnarmenninir fyri, tá teir vunnu finaludystin í FK-kappingini sunnudagin*

Fleyr-Mjølnir 3-1:

# Fleyr aftur í fremstu røð

**Mansliðið hjá havnarfelagnum Fleyr er aftur við í oddinum í føroyskum mansflogbólti, og sunnudagin tryggjaðu teir sær sess í steypafinaluni, sum verður leikt í februar**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fleyr hevur í nøkur ár havt ilt við at vinna seg heilt fram í oddin í meistaradeildini hjá monnum, men í ár tykist liðið hava eina sera góða manning, ið fer at verða við í stríðnum um meistaraheitið. Liðið er blivið munandi styrkt við tað, at fleiri av leikarunum úr Fram, sum nú er farið í søguna, hava valt at halda fram við flogbóltinum í júst Fleyr.

**Mjølnir beit frá sær**

Í finaluni í FK-kappingini sunnudagin hittust gomlu arvafíggindarnir, Fleyr og Mjølnir, og talan gjørdist um ein til tíðir heilt spennandi dyst.

Liðini bæði hava hitst einaferð áður í hesum kappingarárinum, og tá vunnu havnarmenninir ein tryggan 3-0 sigur í Havn. Hesaferð gjørdist dysturin tó eitt sindur meiri spennandi, tí Mjølnir beit væl frá sær.

Fyrsta settið gjørdist bæði javnt og drúgt, men tað vóru klaksvíkingarnir, sum at enda drógu longra stráið og vunnu settið 31-29. Harvið fekk Fleyr ivaleyst ein lítlan hvøkk og eina ávaring um, at teir noyddust at taka sær um reiggj, um teir ætlaðu sær at vinna. Tað gjørdu teir í Fleyr eisini, og tað eydnaðist teimum at vinna trý tey næstu settini, og harvið vunnu teir bæði FK-kappingina og sess í steypafinaluni.

Við sigrinum í FK-kappingini hevur Fleyr staðfest, at teir í ár ætla sær at verða við í oddinum. Seinast Fleyr var føroyameistari í mansdeildini í flogbólti var í ár 2000, og tað er nokk so langt síðani, tá ið talan er um eitt so sigursvant felag sum Fleyr. Harafturat hevur Fleyr ongantíð vunnið steypakappingina hjá monnum, so teir fara ivaleyst at verða rættuliga svangir eftir gullinum, tá ið finalan verður leikt í februar mánað komandi ár.

---

TB-SÍ 3-2:

# TB stríddi seg í steypafinaluni

**Flogbóltskvinnurnar hjá TB vunnu um vikuskiftið árligu FK-kappingina, sum Fleyr skipar fyri, eftir ein tættan og spennandi finaludyst móti SÍ. Við sigrinum hevur TB tryggjað sær pláss í ársins steypafinalu.**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið var áliga FK-kappingin, sum flogbóltsfelagið Fleyr í Havn skipar fyri. Kappingin hevur verið fastur táttur í mong ár, og seinnu árini hava vinnandi liðini í meistaradeildini hjá kvinnum og monnum í kappingini samstundis tryggjað sær sess í steypakappingini.

**Kundi farið báðar vegir**

Í finaludystinum í meistaradeildini hjá kvinnum í FK-kappingini, sum varð leiktur sunnudagin, hittust TB og SÍ. Tvørakvinnur hava seinastu mongu árini verið ein fastur partur av oddinum í føroyskum kvinnuflogbólti, men undan hesum kappingarárinum hevur stór útskifting verið á liðnum, og nógvir ungir leikarar eru komnir á liðið.

Kvinnumanningin úr Sørvági er hinvegin ikki so roynd í fremstu deildini, tí hetta er bert næsta árið hjá teimum í meistaradeildini. Hinvegin hevur SÍ rættuliga nógvar ungar og evnaríkar leikarar, ið eru væl samanspældar, og tær hava fingið eina serstakliga góða byrjan upp á kappingarárið í ár. Júst hesi bæði liðini hittust eisini nýliga í landskappingini, og tá vann SÍ ein sannførandi 3-0 sigur í Sørvági. Tí vóru tær úr SÍ eisini mettar sum favorittar undan dystinum.

Finaludysturin sunnudagin gjørdust tó serstakliga javnur og spennandi, og hann kundi farið báðar vegir. SÍ vann fyrsta settið rættuliga trygt, og tær vóru um reppið eisini at vinna næsta settið, ið gjørdist sera javnt. Tað var tó TB, ið dróg longra stráið í næsta settinum og vann tað 27-25, og so stóð á jøvnum 1-1 í settum.

Triðja settið gjørdist ongantíð spennandi, tí tá fekk SÍ snøgt sagt ikki fótin fyri seg, og TB smurdi tær av og vann settið ruddiliga, 25-11. Nú var greitt, at um SÍ skuldi hava nakran møguleika, skuldu tær vinna fjórða settið. Tað gjørdu tær eisini við úrslitinum 25-21, og tí var neyðugt at fara til ein javnbrótara fyri at finna ein vinnara og harvið eisini fyrsta finaluluttakaran í steypafinaluni. Her var tað TB, ið stóð seg best, og tær vunnu javnbrótaran 15-11. Sostatt hevur TB aftur í ár tryggjað sær sess í steypafinaluni, og so verður spennandi at síggja, um tær megna at vinna steypakappingina. Í fjør noyddust tær at lúta fyri Mjølnir í finaluni.

---

StÍF-Neistin 31-26 (14-8):

# Strandingar hanga í

**Við einum tryggum sigri á Neistanum eydnaðist StÍF at halda seg við í stríðnum um annað plássið í bestu mansdeildini**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tað tykist, sum er ferð veruliga við at koma á hondbóltsspælið á Skála. Fyrstu dystirnar hevði StÍF annars trupult við veruliga at koma ígongd, men seinastu vikurnar hevur framgongdin verið heilt sjónlig. Og tað fekk Neistin eisini at kenna, tá teir vitjaðu sunnudagin.

Snøgt sagt, so fingu teir bláu ongantíð fótin fyri seg í dystinunm, sum vertirnir kontrolleraðu úr enda í annan. Sum seinni hálvleikur leið, so gjørdist talan nærum um veruliga eyðm‡king, og eitt skifti var leiðsan heili 23-13. StÍF megnaði tó ikki at halda dampinum uppi allan vegin, og tí sluppu gestirnir eisini at minka nakað um munin, men spennandi gjørdist tað tó ongantíð.

Sigurin hevur við sær, at strandingar enn halda fast í vónini um at blanda seg í stríðið um plássið aftan fyri Kyndil. Her eru tað fyrst og fremst H71 og VÍF, sum eru kappingarneytarnir. Og tí verður spennandi at vita, hvussu leikur ferð, tá H71 vitjar á Skála komandi vikuskiftið.

Hjá Neistanum tykist setningurin hinvegin vera tann eini. Nevnliga at menna ungu spælararnar, soleiðis at hesir um eitt ár ella tvey kunnu vera við til at stríðast frammi í oddinum. Men til ta tíð mugu bæði spælarar og viðhaldsfólk brynja seg við toli.